TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Hjálparfólk

Tórshavar kommuna søkir við hesum eftir hjálparfólki til útibarnagarðin "Spírin" í Havnadali.

**Starvið**
Talan er um 1 hjálparfólkastarv at arbeiða 30 tímar um vikuna. Talan er um eitt fyribils starv.

**Stovnslýsing**
Í Spíranum eru 20 børn í 5-6 ára aldri.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har náttúran hevur alstóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum og hava virðing fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og vera førur fyri sjálvur at taka avgerðir í arbeiðinum. Somuleiðis er neyðugt, at umsøkjarin dámar væl at vera úti í náttúruni saman við børnunum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigrun Davidsen, leiðara, tlf. 31 33 21, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera útibarnagarðinum Spíranum, c/o Føroya Ríðingarfelag, Havnardalur, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. september 2001.

SNARSKIVAN

# Frá Kollafjarðar kirkjuráð

Kirkjuráðsval verður týsdagin 06.11.2001.

Vallistin fyri Kollafjarðar sókn liggur frammi á kommunuskrivstovuni allar gerandisdagar frá 23. til og við 31. august. Opið er kl 18:00 - 19:00.

Er onkur av misgáum ikki á listanum, skal viðkomandi skrivliga boða formanninum frá innan 08.09.2001.

Kollafjørður 21.08.2001
**Vegna valstýrið fyri Kollafjarðar kirkju**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Reingerðarfólk

Dagstovnurin á Fløtum søkir við hesum eftir tveimum reingerðarfólkum.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna, aftaná kl. 17.00.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, tlf. 31 99 59/21 99 59.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu vera dagstovninum á Fløtum, Øksnagerði, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3. september 2001.

SNARSKIVAN

# Klinikkassistentur

Sókt verður eftir útbúnum klinikkassistenti at byrja frá 1. sept. 2001.

Sett verður sambært S&K sáttmála.

Skrivlig umsókn at senda til

**Tannlæknastovuna**
A. C. Evensensgøta 14
FO-110 Tórshavn
v/ Kristian Djurhuus og Jakku Heinesen

# Goymslufólk

Vit sóknast eftir fólki til eykalutagoymslu okkara sum skjótast.

Útbúgving eingin treyt, men royndir innan bilar er ein fyrimunur.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**Ivan Johansen bilar**
postboks 3205 · 110 Tórshavn
tlf. 313666

**innan 1. september**

CITROËN · Mercedes-Benz · MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar

# Søluleiðari

Vit sóknast eftir fólki, ið kann taka sær av sølu og service. Aldur hevur ongan týdning, ein handverkaraútbúgving kann koma væl við, men er ongin treyt. Løn eftir avtalu.

Hevur tú hug til eitt útfordrandi, spennandi og frítt arbeiði og dugur tú at arbeiða sjálvstøðugt, hava vit kanska eitt arbeiði til tín.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Finn Mortensen, tlf. 212544, ella senda E-mail til gassola@post.olivant.fo

Umsóknin til starvið skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 08.09.2001.

**AGA Føroyar sp/f**
Akranesgøta 2 · Postboks 1088
110 Tórshavn · Tlf. 315544 · Fax 311706

# Arbeiðsmaður

søkist til náttararbeiðið í bakarínum. Nærri upplýsingar um arbeiðstíðir, løn o.a. fáast við at venda sær til Christian.

BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI

Hoyvíksvegur 65 ·Tlf. 312161 ella 217261

# Bilførari

søkist til morgunarbeiðið. Nærri upplýsingar um arbeiðstíðir, løn o.a. fáast við at venda sær til Bent.

BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI

Hoyvíksvegur 65 ·Tlf. 312161 ella 222325

## Frá Vesturkirkjuni
# Fráboðan um kirkjuráðsval

Kirkjuráðsval verður **týsdagin 6. november 2001**. Vallistin liggur frammi á skrivstovuni í kirkjuhallaranum allar gerandisdagar frá 23. til 31. august, kl. 17-18. Er onkur av misgávum ikki á listanum, skal viðkomandi siga frá innan 8. september.

Markið millum Tórshavnar vestaru og Tórshavnar eystaru kirkjusókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Valstýrið fyri Tórshavnar vestaru kirkjusókn**



Starv

# Virkissamskipari

Vegna tað, at viðkomandi, sum hevur røkt starvið sum virkissamskipari á stjóraskrivstovuni fer undir hægri útbúgving í útlandinum, fara Strandfaraskip Landsins (SL) við hesum at søkja eftir einum virkissamskipara at seta skjótast gjørligt.

Stjóraskrivstovan er ein stápsdeild undir stjóranum og skal sum høvuðsuppgávu verða leiðsluni til hjálpar.

Á SL er talan um eitt desentralt arbeiðsumhvørvi við nógvum eindum runt um í landinum. Hetta hevur m.a. við sær ein stóran tørv á samskipan innan tænastuna og umsitingina. Stjóraskrivstovan skal virka sum ein samskipandi funktión, har miðað verður ímóti at skapa felags karmar at virka undir tænastuliga og umsitingarliga.

SL hava knýtt eindirnar tættari saman við kunningartøkni og skapar hetta betri fortreytir fyri at tryggja eina góða samskipan.

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins.

Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðar ráðlegging við ábyrgd fyri samskipan av ymsu deildunum og virkisøkjunum.

Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni. Harafturat skal deildin verða við í teirri menning og nýskipan, ið SL hevur fyri framman.

**Skrivarastarvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá samskiparanum eru:

- Avgreiða mál vegna stjóra ella leiðslu
- Stýra og umsita journal, hølisviðurskifti, kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Verða við til at fyriskipa, samskipa og lata leiðsluupplýsingar av ymiskum slag
- Fyriskipa verkætlanir, eitt nú útbúgvingarætlan, journalskipan, marknaðarstrategi, virksemisroknskap oa.

Innihaldið í starvinum er nærri ásett í einari starvslýsing.

Virkissamskiparin fær ábyrgdina av at menna eina samskipandi funktión og arbeiða víðari við nøkrum avbjóðandi verkætlanum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan fyrisiting og handil, t.d. HA, HH ella tilsvarandi
- Helst royndir innan tænastu og fyrisiting
- Kunnleiki og royndir innan kunningartøkni/edv á brúkarastøði (td. teldukoyrikort).
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. september 2001, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 343000 ella e-mail: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Heystkappríðing og veitsla



Tilmelding til heystkappríðingina í Marknagili, sum verður leygardagin 1. september kl. 14.00 er á telefon 421643 og 315242 til týsdagin 28. august kl. 19.00.

Kappast verður í: Skeið, Trav, Tvíspor ung og Tvíspor vaksin (1. og 2. flokkur).

Kappríðing í Old-boys verður aftaná. Ross, sum hava vunnið premiu fyrr á degnum, kunnu ikki luttaka í Old-boys. Tilmelding til Old-boys er á staðnum.

Allir ríðarar skulu nýta hjálm.

Veitslan verður um kvøldið kl. 19.30 í felagshúsinum.

Atgongumerki verða seld í felagshúsinum týskvøldið 28. august millum kl. 19 og 21. Kostnaður kr. 150,00.

**Føroya Ríðingarfelag**

# Skip til sølu

## »MAI« Línibátur/garnabátur Føroyskt flagg



| | |
|---|---|
| Bygt: | 1947 Thurø, Danmark – eik/bók |
| Stødd: | 24.95 m x 6.62 m |
| Klassi: | Sjóvinnufyrisitingin |
| Last: | Frystilast |
| Høvuðsmotorur: | 500 Bhp Grenaa Diesel, nýggjur frá 1974 |

Vilt tú vita meira um skipið, so ring til:

**P/F THOR**
FO-420 Hósvík
Tlf. 422503

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg